## Heðin í Ribarhúsi

Listamaðurin Heðin Kambsdal hevur í hesum døgum framsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Á framsýningini eru nýggir málningar, sum listamaðurin hevur málað hetta seinasta árið. Myndaevnini eru náttúrulýsingar úr ymsum pørtum av landinum, og tær eru málaðar við olju á lørift. Framsýningin í Ribarhúsi lat upp seinasta hósdag og er opin til 28. mars. Opið er mánadag til fríggjadag frá kl. 15 til 17.30 og leygardag frá kl. 11 til 13.

## Misnøgd við blokkin

Ikki allir limir í grønlendska Landstinginum vóru líka fegnir, tá landsstýrið fríggjadagin legði fram semjuna við donsku stjórnina um bokkkstuðulin í ár, næsta ár og í 2009. Eftir semjuni verður blokkurin óboyttur ella 3,2 mia. krónur um árið, men tað hildu summir tinglimir vera ov lítið. Men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Josef Motzfeldt, segði, at høvdu danir fingið sín vilja, hevði blokkurin verið uppaftur minni, enn hann er.

Alfred Olsen, sitandi næstformaður:

# Stríðsval ein rættur í Sambandsflokkinum

**Floksskipanin leggur upp til val á hvørjum ári, og tí metir Alfred Olsen, sitandi næstformaður, ikki, at Jóhan Dahl við at stilla upp ímóti honum skapar split í flokkinum.**



POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin hevur landsfund komandi vikuskiftið.

Mest spennandi punkt í skránni man uttan iva vera næstformansvalið, tí hesaferð er talan um stríðsval. Tað er Jóhan Dahl, tingmaður fyri Suðuroynna, ið hevur latið seg stilla upp móti sitandi næstformanni, Alfred Olsen úr Eysturoynni.

Jóhan Dahl hevur fyrr roynt at sloppi sær upp í leiðslu floksins. Hetta hendi á seinasta landsfundi, tá suðuroyartingmaðurin stillaði upp móti formanni Sambandfloksins, Kaj Leo Jóhannesen. Sum kunnugt tapti Jóhan Dahl valið tá, og sum eina avleiðing av hesum tók hann seg úr flokkinum.

Sjógvurin slætnaði kortini aftur, og nú hevur Jóhan so gjørt av at royna seg í valinum um sessin sum næstformaður í flokkinum.

Alfred Olsen hevur sitið sum næstformaður síðani 2001, tá hann var einasta valevni. Men støðan við stríðsvalið er honum kortini ikki ókend, tí hann hevur áður havt mótvalevni til sessin. Tað var í 2003, tá táverandi sambandsmaðurin Heðin Mortensen stillaði upp móti Alfredi Olsen. Eysturoyartingmaðurin vann tað valið rímiliga ruddiliga við umleið tveimum triðingum av atkvøðunum.

### Ikki leita stuðul enn

Freistin at boða frá uppstilling var ikki úti fyrr enn sunnukvøldið, og tí hevði Alfred Olsen ikki rættiliga havt stundir at gjørt støðuna upp tá Sosialurin tosaði við hann í morgun.

Alfred metir tó ikki, at tað fer at skaða flokkin, at talan aftur nú verður um eitt stríðsval.

– Í floksskipanini verður lagt upp til val á hvørjum ári, so tað er rætturin hjá einum og hvørjum at stilla upp til bæði formans- og næstformansval, sigur Alfred Olsen.

Hann sigur, at hann í dag ætlar sær at umhugsa støðuna. Tíðin fram til valið fríggjakvøldið er ikki so long, og enn hevur hann ikki hvørki kanna eftir ella leita sær stuðul millum limirnar í lokalfeløgunum.

Og í so máta stendur hann púra á berum, tí sum sitandi næstformaður er hann av sær sjálvum stillaður upp til valið, um ikki so er, at hann boðar frá, at hann ikki stillar upp. Sostatt hevur hann framman undan eitt lokalfelag, sum stillar hann upp.

Fríggjakvøldið fer so at vísa, hvussu raksturin gjøgnum vikuna fer at hildnast, hvørt Alfred framhaldandi er næstformaður í Sambandsflokkinum enn eitt skeið.

**FAKTA**

Atkvøðurnar í sambandi við valið í Sambandsflokkinum eru býttar soleiðis: Tey sjey valfeløgini (Norðoya, Eysturoya, Norðurstreymoya, Vága, Sandoyar, Suðuroyar og valfelagið Føroya Val) 5 atkvøður í part, teir 7 tingmenninir hvør sína atkvøðu, teir báðir landsstýrismenninir hvør sína, starvsnevndin 4. Vanliga hevur eisini ungmannafelagið´5 atkvøður, men tað er óvirkið í løtuni, og hartil hevur Fólkatingsumboðið eina atkvøðu, men flokkurin hevur einki í løtuni. Talan er sostatt um 48 atkvøður.

Kaj Leo Jóhannesen, formaður Sambandsfloksins:

# Ein demokratiskur rættur

**– Tað stendur øllum frítt at stilla upp í Sambandsflokkinum. Tað er ein demokratiskur rættur og vísir, at tað er lív í flokkinum, hóast meiri enn 100 ára gamal, sigur Kaj Leo Jóhannesen, nú talan aftur verður um stríðsval í flokkinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin .fo*

Kaj Leo Jóhannesen, formaður í Sambandsflokkinum heldur einki forgjørt vera í, at talan aftur í ár verður um stríðsval í flokkinum. Tvørtur ímóti heldur hann tað vera sunt, at fleiri bjóða seg fram at taka ábyrgd.

–Hetta er ein demokratiskur møguleiki hjá einum og hvørjum í flokkinum, og gevur samstundis lokalu valfeløgunum møguleika at gera sína ávirkan galdandi, sigur Kaj Leo.

Formaður Sambandsfloksins heldur ikki, at hetta er nakað, ið skapar ósemju og tvídrátt í flokkinum. Gaman í hevði tað fyri eina tíð óhepnar fylgjur, tá Jóhan Dahl til seinasta landfund tapti formansvalið móti Kaj Leo, men tað er alt »vatn undir brúnni«, sum tikið verður til.

– Tað valdar friður og semja í Sambandsflokkinum, og arbeiðið innanflokka gongur stak væl. Sjálvur havi eg eitt gott samstarv við bæði valevni, og báðir eru dugnaligir menn, sigur Kaj Leo Jóhannesen.

Hann heldur tað bara vera so mikið meiri áhugavert, at valfeløgini nú fáa tvey valevni at velja ímillum, og hetta vísir bara, at tað framvegis er hópurin av lívi í flokkinum, hóast hann hevur rundað tey 100 árini.

Sjálvur bíðar Kaj Leo Jóhannesen bara í spenningi til fríggjakvøldið, og hann væntar, at báðir leirar fara at reka dúgliga hesa vikuna. So má tíðin vísa, um næstformaðurin í Sambandsflokkinum aftaná fríggjakvøldið eitur Alfred Olsen ella Jóhan Dahl.



*Kaj Leo Jóhannesen hevur onki ímóti, at tvey valevni bjóða seg fram til næstformann í flokkinunum*

**Framhald um landsfundin hjá Sambandsflokkinum á síðu 15**